

IRF

# ÁRSFRÁSØGN 2021

Myndir: Ólavur Frederiksen, Harriet Olafsdóttir og IRF

estra VASTI
Svanamerktur prentlutur 541-894

# Innihald

Upplýsingar um felagsskapin ..... 4
IRF fyriskipan ..... 5
Limakommunur og fólkatal ..... 6
Leiðslufrágreiðing ..... 7
Hendingar í árinum ..... 12
- Nýggjur fíggjarleiðari settur í starv ..... 13
- 25 ár í starvi hjá IRF ..... 13
- Nýggj nevnd ..... 14
- Góð ráð í sambandi við húsabygging og umvæling ..... 14
- Skiljing av sjóvinnuburturkasti ..... 15
- Filmar um skiljing og endurvinning ..... 16
- Reisigildi úti í Nýggjheiðum ..... 18
- Tiltak fyri kommunal bingu- og endurnýtslupláss ..... 18
- Starvsfólkatiltak við Matkovanum ..... 19
- Alt virksemið ISO-góðkent ..... 20
- Rebekka fingið ÚSSM-prógv ..... 21
- Nýggj vekt á Hagaleiti ..... 22
- Nýtt borðspæl ..... 23

Hagtøl 2021 ..... 24
- Endurvinning ..... 26
- Pappír og papp ..... 26
- Plast ..... 26
- Elektronikkur ..... 27
- Jarn og metal ..... 27
- Serburturkast ..... 28
- Brenning ..... 28
- Tyrving ..... 30
- Oljureinsiverkið ..... 30
- Rottangatøming ..... 30

Høvuðstøl ..... 31
Talvur ..... 32
Gongdin í rakstrinum ..... 35
Rakstrarúrslit samanborð við fíggjarætlan ..... 36
Leiðsluátekning ..... 37
Váttan frá óheftum grannskoðara ..... 38
Nýttur roknskaparháttur ..... 40
- Rakstrarroknskapurin ..... 40
- Fíggjarstøða ..... 41

Rakstrarroknskapur ..... 42
Fíggjarstøða ..... 43
Rakstrarroknskapur býttur á økir ..... 44
Notur til roknskapin ..... 45
Gjaldførisfrágreiðing ..... 54
Rakstrarroknskapur fyri oljureinsiverkið ..... 55
Rakstrarroknskapur fyri reinsitænastuna ..... 56
Rakstrarroknskapur fyri verkstaðið ..... 57
Rakstrarroknskapur fyri serhøllina ..... 58
Rakstrarroknskapur fyri endurvinningarskipanina ..... 59



# UPPLÝSINGAR UM FELAGSSKAPIN

**Felagsskapurin**

L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin IRF
Víkarvegur 107, 520 Leirvík
irf@irf.fo
www.irf.fo
Tlf: 41 42 43
V-tal: 353477
Heimstaðarkommuna: Eysturkommuna
Starvsfólk: 85 ársverk

**Nevnd**

Hans Anders Jacobsen, Eysturoy, formaður
Jóanis Albert Nielsen, Vágar, næstformaður
Gunvá við Keldu, Norðoyggjar, nevndarlimur
Alvi Mortensen, Suðuroy, nevndarlimur
Oluf Müller, Norðstreymoy, nevndarlimur
Bjarki Henriksen, Sandoy, nevndarlimur

**Stjórn**

Poul Andrias Joensen, stjóri

**Grannskoðan:**

**P/f JANUAR**
Óðinshædd 13
Postsmoga 30, FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 47 00
januar@januar.fo
www.januar.fo

Ársroknskapurin fyri 2021 er góðkendur á ársaðalfundinum, tann ___________ 2022

_______________________________

Fundarstjóri

# IRF fyriskipan

**28 limakommunur**

**Aðalfundur**

**Nevnd**



**Hans Anders Jacobsen**
Eysturoy, nevndarformaður



**Jóanis Albert Nielsen**
Vágar, næstformaður



**Gunvá við Keldu**
Norðoyggjar, nevndarlimur



**Alvi Mortensen**
Suðuroy, nevndarlimur



**Oluf Müller**
Norðstreymoy, nevndarlimur



**Bjarki Henriksen**
Sandoy, nevndarlimur

**Leiðsla**



**Poul Andrias Joensen**
Stjóri



**Jóhannus Danielsen**
Fíggjarleiðari



**Súsanna Berg**
Umhvørvisleiðari

**Deildarleiðarar**



**Andrias Joensen**
Brennistøð, Móttøkuhøll, Oljureinsiverk, Endurvinningarskipan



**Durita Toftegaard**
Innsavning, Reinsitænasta



**Torfinn Mortensen**
Innsavning í Suðuroy, Støðin í Trøllavík



**Petur Højgaard**
Verkstaður

# Limakommunur og fólkatal pr. 1. januar

| Limakommunur-økir | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðoyggjar** | | | | | |
| Fugloyar kommuna | 38 | 41 | 38 | 37 | 37 |
| Viðareiðis kommuna | 354 | 354 | 347 | 361 | 355 |
| Hvannasunds kommuna | 418 | 418 | 416 | 415 | 414 |
| Klaksvíkar kommuna | 5.398 | 5.338 | 5.250 | 5.194 | 5.110 |
| Kunoyar kommuna | 147 | 141 | 156 | 146 | 143 |
| **Tilsamans** | **6.355** | **6.292** | **6.207** | **6.153** | **6.059** |
| **Eysturoy** | | | | | |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.612 | 1.574 | 1.590 | 1.552 | 1.541 |
| Eysturkommuna | 2.256 | 2.211 | 2.156 | 2.119 | 2.084 |
| Nes kommuna | 1.450 | 1.399 | 1.338 | 1.326 | 1.279 |
| Runarvíkar kommuna | 4.270 | 4.215 | 4.165 | 4.047 | 3.945 |
| Sjóvar kommuna | 1.138 | 1.111 | 1.089 | 1.064 | 1.025 |
| Eiðis kommuna | 789 | 767 | 762 | 724 | 720 |
| **Tilsamans** | **11.515** | **11.277** | **11.100** | **10.832** | **10.594** |
| **Streymoy** | | | | | |
| Sunda kommuna | 1.821 | 1.811 | 1.811 | 1.796 | 1.749 |
| Kvívíkar kommuna | 601 | 624 | 597 | 592 | 596 |
| Vestmanna kommuna | 1.263 | 1.248 | 1.244 | 1.236 | 1.231 |
| **Tilsamans** | **3.685** | **3.683** | **3.652** | **3.624** | **3.576** |
| **Vágar** | | | | | |
| Vága kommuna | 2.163 | 2.140 | 2.130 | 2.086 | 2.056 |
| Sørvágskommuna | 1.252 | 1.220 | 1.237 | 1.202 | 1.176 |
| **Tilsamans** | **3.415** | **3.360** | **3.367** | **3.288** | **3.232** |
| **Sandoy** | | | | | |
| Sands kommuna | 527 | 537 | 533 | 521 | 520 |
| Skopunar kommuna | 453 | 454 | 440 | 461 | 465 |
| Skálavíkar kommuna | 138 | 145 | 144 | 139 | 142 |
| Húsavíkar kommuna | 109 | 111 | 115 | 110 | 112 |
| Skúvoyar kommuna | 41 | 43 | 40 | 42 | 42 |
| **Tilsamans** | **1.268** | **1.290** | **1.272** | **1.273** | **1.281** |
| **Suðuroy** | | | | | |
| Hvalbiar kommuna | 679 | 670 | 679 | 675 | 682 |
| Tvøroyrar kommuna | 1.769 | 1.744 | 1.716 | 1.714 | 1.720 |
| Fámjins kommuna | 84 | 86 | 83 | 79 | 79 |
| Hovs kommuna | 102 | 97 | 99 | 101 | 98 |
| Porkeris kommuna | 317 | 319 | 318 | 319 | 313 |
| Vágs kommuna | 1.380 | 1.391 | 1.345 | 1.342 | 1.364 |
| Sumbiar kommuna | 357 | 350 | 358 | 363 | 358 |
| **Tilsamans** | **4.688** | **4.657** | **4.598** | **4.593** | **4.614** |
| **IRF TILSAMANS** | **30.926** | **30.559** | **30.196** | **29.763** | **29.356** |



# Leiðslufrágreiðing

### Inngangur

Henda leiðslufrágreiðing er tann fyrsta hjá sitandi nevnd, sum tók við á aðalfundinum í apríl 2021.

Eins og undanfarna ár hevur koronufarsóttin í 2021 havt stóra ávirkan á samfelagsgongdina í Føroyum, eisini hjá IRF. Virksemið hjá IRF verður mett at hava so stóran samfelagsligan týdning, at tað ikki má steðga upp. IRF hevur tí havt serligar innanhýsis mannagongdir millum starvsfólkini fyri at minka um innanhýsis smittuvandan. Tað hevur eydnast rættiliga væl, tó at IRF eins og onnur arbeiðspláss ikki er sloppið heilt undan farsóttini. Fleiri starvsfólk eru blivin smittað, og onnur hava verið í sóttarhaldi. Hetta hevur av og á givið avbjóðingar í dagliga arbeiðinum, men við góðum og ábyrgdarfullum starvsfólkum hevur IRF røkt dagligu uppgávurnar, tó at tað onkuntíð hava verið smærri seinkingar, t.d. í ruskinnsavningini.

Búskaparliga royndist 2021 væl betri enn mett frammanundan, og serliga útflutningurin av endurvinningartilfari royndist væl.

Hjá IRF starvast á leið 100 fólk, og bæði nevnd og leiðsla eru errin um hesi starvsfólk, sum hvønn dag lyfta eina uppgávu av alstórum samfelagsligum og umhvørvisligum týdningi.

Aftur í 2021 hevur virksemið hjá IRF verið merkt av nógvum byggivirksemi. Arbeiðið við spennandi verkætlanini úti í Nýggjheiðum í Kvívík at byggja nýtt rottanga- og tyrvingarpláss hevur hildið fram, og á sumri 2021 varð reisigildið hildið.

Á Hagaleiti hevur arbeiðið við umsitingarbygninginum hildið fram, og serliga er tað millumbygningurin, sum knýtir brennistøðina saman við nýggja umsitingarbygningin, ið arbeitt hevur verið við. Eisini hevur kontrollrúmið á brennistøðini, sum er frá 1989, fingið eina størri tiltrongda dagføring.

Eins og undanfarin ár hevur 2021 verið eitt hendingarríkt ár, og væntandi fer 2022 at vera minst líka spennandi.

## Búskaparliga gongdin

Rakstrarúrslitið fyri 2021 er 4,5 mió. kr. í avlopi. Í rakstrarætlanini er roknað við 270 tkr. í avlopi. Sostatt er úrslitið 4,2 mió. kr. betri, enn roknað var við.

Inntøkurnar eru 8,1 mió. kr. hægri enn mett, annar uttanhýsis kostnaður er 2,6 mió. kr. hægri, og starvsfólkakostnaður er 1,3 mió. kr. hægri enn mett frammanundan. Avskrivingarnar og rentur eru á leið tað, sum mett var.

Í 2021 hevur IRF gjørt íløgur fyri tilsamans 62,0 mió. kr. Av hesum vórðu 1,8 mió. kr. nýttar til brennistøðina, 4,5 mió. kr. til umsitingarbygningin á Hagaleiti, 47,5 mió. kr. á tyrvingar- og umlastingarplássum, og 8,2 mió. kr. vórðu nýttar til bilar, bingjur og KT.

Roknskapirnir fyri oljureinsiverkið, reinsitænastuna, verkstaðið, serhøllina og endurvinningarskipanina eru við í høvuðsroknskapinum, men eru samstundis settir upp í egnum skjølum í ársfrágreiðingini.

Bruttoúrslitið fyri 2021 gjørdist 66,2 mió. kr., sum er 5,3 mió. kr. meira enn í 2020. Ársúrslitið gjørdist 4,5 mió. kr. í avlopi, sum er 3,8 mió. kr. betri enn í 2020.



Fíggjarstøðan javnvigar við 266 mió. kr. í 2021 í mun til 227 mió. kr. í 2020.

Gjaldførið við ársenda 2021 var 2,5 mió. kr.

## Burturkastnøgdin

Í 2021 hevur IRF tikið móti 42.109 tonsum av burturkasti, sum er 3,4% meiri enn í 2020.

Til samanbering kann nevnast, at IRF í 2020 tók ímóti 40.730 tonsum av burturkasti, sum var 3% minni enn í 2019.

Í árunum 2018 til 2019 vaks burturkastnøgdin, sum IRF tók ímóti 19 %, úr 35.260 tonsum í 2017 upp í 41.996 tons í 2019.

Burturkastnøgdin í 2021 er sostatt áleið sama stigi sum í 2019, og stóri vøksturin, sum vit upplivdu árini 2017-2019, er steðgaður.

Brennistøðin á Hagaleiti brendi 24.891 tons av burturkasti í 2021, og hetta er ein minking upp á 4,1% samanborið við 2020, tá 25.945 tons vórðu brend. Havast skal í huga, at í sambandi við útbyggingina av brennistøðini í 2018 lógu 1.544 tons av burturkasti eftir á goymslu við árslok 2019, og tey blivu brend í 2020.

## Útflutningurin

IRF sendir nógvar ymiskar burturkastbólkar av landinum til endurvinning. Sum talvur aðrastaðni í ársfrásøgnini vísa, er samlaði útflutningurin í 2021 13.968 tons, sum er 18,6% meira enn í 2020, tá útflutningurin var 11.777 tons.

Stóra økingin er serliga innan fyri burturkastbólkarnar jarn, papp, pappír og plast. Umframt at nøgdin er vaksin, fær IRF betri prís fyri tað, sum verður útflutt til endurvinning. T.d. er prísurin á pappíri øktur 139%, pappi 72% og jarni 53% í 2021.

Í 2021 eru tríggjar avskipingar av jarni, í 2020 var bert ein. Vanliga eru tvær avskipingar um árið.

Øktu útflutningsnøgdirnar og góðu prísirnir hava við sær, at raksturin av endurvinningarskipanini, sum vanliga hevur givið hall, í 2021 gevur eitt munandi avlop, og hetta er høvuðsorsøkin til góða ársúrslitið í 2021.

Avlopið av endurvinningarskipanini í 2021 var 3,2 mió. kr., eftir at hallið í 2020 var 2,1 mió. kr.



## Limakommunur og fólkatal

1. januar 2022 vóru vit 53.664 fólk í Føroyum, harav 30.926 búðu í limakommunum hjá IRF. Í limakommununum eru hetta 367 fólk fleiri enn við ársbyrjan 2021. Vit uppliva enn tilflyting í Føroyum, og IRF roknar við øktum fólkatali í langtíðarætlan felagsins.

## Limagjald

Limagjaldið hevur verið óbroytt síðstu árini. Á seinasta aðalfundi bleiv avgjørt at prístalsjavna limagjaldið. Tað hevði við sær eina hækking upp á 20 kr. pr. fólk. Limagjaldið í 2022 er í alt 1.325 kr. pr. fólk. Av hesum eru 1.122 kr. fyri ruskgjald, og 203 kr. eru fyri rottangagjald.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Í desember 2021 samtykti nevndin at keypa verkstaðið í Klaksvík, sum IRF hevur leigað í gott 10 ár. Um ársskiftið var skeytið ikki skrivað liðugt, og harumframt manglaðu onnur viðurskifti eisini at fáast upp á pláss.

Keypið umfatar grundøkir, bilvrakspláss og bygning. Ætlanin er at umvæla bygningin og økið uttanum. Kostnaðarmetingin av keypi og umvæling er 9,0 mió. kr, sum verður fíggjað við lántøku.

Annars er einki hent eftir roknskaparlok, sum broytir metingina av fíggjarstøðu felagsins.



## Rakstrarváðar

Seinnu árini hevur verið fólkavøkstur og viðgongd í búskapinum í Føroyum. Hetta hevur havt hækkandi inntøkur við sær hjá IRF. Skuldi vend komið í, og talan verður um fólkaminking og afturgongd í búskapinum, kann væntast, at inntøkan minkar. IRF fylgir væl við búskapargongdini, so tað eisini í framtíðini er samsvar millum inntøkur og útreiðslur hjá felagnum.

Eisini spenta politiska støðan i Europa seinastu mánaðirnar kann hava ávirkan á búskapin hjá IRF. Hetta kann tó vera torført at meta um í løtuni.

IRF hevur ikki týðandi upphæddir útistandandi hjá einstøkum skuldara. Felagsins skuldarar halda sum heild væl sínar skyldur, men um afturgongd verður í búskapinum, kann tað hava við sær, at gjaldsevnini hjá skuldarunum versna. Tað kann hava ávirkan á gjaldførið hjá felagnum. IRF fylgir væl við gongdini í útistandandi og hevur greiðar mannagongdir á skuldaraøkinum.

Renturnar á lánunum hjá felagnum eru bæði fastar og broytiligar. Vandi er við broytiligum rentum, og felagið fylgir væl við gongdini á rentuni.

## Samfelagsábyrgd og menning

Samfelagsábyrgd er partur av øllum virkisætlanum hjá IRF. Felagið lagar seg til broytt og herd umhvørviskrøv uttanífrá, t.d. í DK og ES í sambandi við lógarbroytingar av burturkastviðgerð, útláti og orkunýtslu. IRF hevur góðar førleikar á burturkast- og umhvørvisøkinum og vil ganga undan at menna starvsfólk felagsins, so tey eru útbúgvin og tilvitað um hesa samfelagsábyrgd, sum IRF átekur sær.

Broytt lógar- og samfelagskrøv, menning, tillagingar og broytingar á burturkast- og umhvørvisøkinum kunnu hava útreiðslur við sær, sum dýrka um rakstur felagsins.



### Íløgur
IRF hevur gjørt íløgur fyri 62,0 mió. kr. í 2021. Hetta er knapt 8,0 mió. kr. minni enn upprunaliga mett. Orsøkirnar eru í høvuðsheitum, at íløgan úti í Nýggjheiðum bleiv minni enn mett, og at 3 nýggir posabilar, sum eru bílagdir og skuldu koma í 2021, ikki koma fyri enn í 2022.

### Rottanga- og tyrvingarpláss úti í Nýggjheiðum
Arbeiðið við stóru verkætlanini úti í Nýggjheiðum í Kvívík hevur verið í gongd alt 2021 og heldur fram í 2022. Arbeiðið hevur gingið væl, men vánaliga veðrið seinastu tveir vetrarnar hevur havt við sær fleiri skrásettar spilldagar.

Tá ið arbeiðið byrjaði, var ætlanin, at tað skuldi verða liðugt í seinnu helvt av 2022, og tað er framvegis ætlanin. Í mai 2022 verður rottangaevjuútgerðin sett upp, og royndarkoyringin av henni byrjar eftir summarfrítíðina.

Tað er IRF, sum eigur og rekur rottanga- og tyrvingarplássið, men ein samstarvsavtala er gjørd við Tórshavnar kommunu um at reka plássið sum eitt felags rottanga- og tyrvingarpláss.

IRF tók í 2019 eitt lán upp á 120 mió. kr. til verkætlanina.

### Nýggjur umsitingarbygningur á Hagaleiti
Í september 2020 flutti umsitingin hjá IRF í nýggja umsitingarbygningin eftir at hava húsast 3 ár í leigaðum hølum í Klaksvík.

Í 2021 er arbeitt við at samanbyggja umsitingarbygningin við brennistøðina. Ein millumbygningur er bygdur, sum er høvuðsinngongd til brennistøðina og umsitingarbygningin. Arbeiðið er nú liðugt.

Nýggi umsitingarbygningurin er 710 fermetrar til støddar í trimum hæddum, umframt eina samanbygging upp á 180 fermetrar. Samlaði kostnaðurin, íroknað ráðgeving og innbúgv, er 16,8 mió. kr.

### Brennistøðin
Kontrollrúmið á brennistøðini er dagført í 2021. Hetta er fyrsta dagføring av rúminum, síðan brennistøðin varð bygd í 1989. Umframt at dagføringin var tiltrongd, eru umstøðurnar hjá vaktarfólkinum eisini gjørdar munandi betri, m.a. við nýggjum køki og upphaldsrúmi. Kostnaðurin var 1,1 mió. kr.

Í 2022 verða brúsu- og skiftingarrúmini og starvsfólkarúm dagførd. Kostnaðurin er mettur til 1,0 mió. kr.

### Nýggj vekt á Hagaleiti
Alt burturkast, sum kemur inn til IRF, verður í dag avroknað í rúmmetrum (m$^3$), men í framtíðini fer IRF at avrokna í vekt (kg). Í hesum sambandi er íløga gjørd í eina vekt á Hagaleiti. Arbeiðið varð liðugt í januar 2022, og samlaði kostnaðurin er 1,4 mió. kr. Árið 2022 verður brúkt til at fyrireika skiftið frá rúmmetrum til vekt, og ætlanin er at broyta avrokningarhátt fyrst í 2023.

### Akfør
Stórur partur av virkseminum hjá IRF er innsavnan og flutningur av burturkasti. IRF hevur gjøgnum árini gjørt íløgur í nógv ymisk akfør, sum dagliga hava nógv virksemi og m.a. koyra nógv. Akførini krevja sjálvandi nógv viðlíkahald, og tørvur er eisini regluliga á at endurnýggja og keypa fleiri akfør.

Í 2021 keypti IRF ein bil til reinsitænastuna fyri 3,4 mió. kr. og fýra smærri posabilar fyri tilsamans 1,0 mió. kr.

IRF hevur bílagt tríggjar nýggjar posabilar til meginøkið og ein nýggjan lastbil til Suðuroynna. Bilarnir eru seinkaðir, men koma í 2022. Eisini verður ein av bilunum til reinsitænastuna umbygdur. Samlaði kostnaðurin fyri allar bilarnar er 6,8 mió. kr.

### Starvsfólkaøkið
Í 2021 varð ein HR-leiðari settur í parttíðarstarv hjá IRF í eitt ár, og nú hevur IRF sett ein HR-leiðara í fast starv.

Eitt av málunum í nýggja umhvørvispolitikkinum hjá IRF, sum er grundaður á tey 17 heimsmálini hjá ST, er, at IRF skal verða eitt av Føroya bestu arbeiðsplássum. Við støði í hesum varð avgerð tikin um at seta ein HR-leiðara fulla tíð.

IRF hevur á leið 100 starvsfólk, og tað hevur nógva umsiting og nógv samskifti við sær. HR-leiðarin hevur ábyrgdina av starvssetanum og starvsfólkaviðurskiftum annars, og uppgávurnar hjá HR-leiðaranum eru m.a., í samráð við leiðsluna, at skipa fyri áhaldandi førleikamenning á øllum økjum eins og at tryggja, at øll virkisøki verða stuðlaði av HR-tiltøkum.

### ISO-góðkenning
Í 2021 eru allar deildir hjá IRF góðkendar sambært umhvørvisstýrisskipanini ISO-14001. Harumframt hevur IRF í 2021 eisini fingið ISO-góðkenning fyri arbeiðið við teimum seks heimsmálunum, sum umhvørvispolitikkur felagsins byggir á.

Endamálið við leiðsluskipanunum er eitt nú at tryggja, at øll starvsfólk arbeiða eftir sama leisti, soleiðis at góðskan á arbeiðinum verður so góð og jøvn sum gjørligt.

Hetta setur stór krøv til eitt nú mannagongdir og skrásetingar og fer at merkjast hjá flest øllum starvsfólkunum.

### Komandi íløgur
IRF arbeiðir alla tíðina við at útbyggja og dagføra hølisumstøðurnar. Ítøkiligar ætlanir eru at byggja nýggja umlastingarstøð í Trøllavík, og vónandi kann arbeiðið byrja í 2023. Eisini verður arbeitt við ætlanum á Hagaleiti, m.a. við eini um- og útbyggingarætlan av endurvinningarhøllini.

### Endi
Hóast nógvar íløgur eru gjørdar seinastu árini, og mannagongdirnar í samband við burturkastinnsavnan, móttøku, endurvinning og burturbeining alla tíðina verða dagførdar og mentar, eru framvegis stórar avbjóðingar fyri framman á burturkast- og endurvinningarøkinum. Vit hava øll eina ábyrgd, og í felag eiga vit at finna og samstarva um røttu loysnirnar.

Eins og í umheiminum gerast vit í Føroyum meira og meira umhvørvistilvitað og vilja taka størri ábyrgd á okkum. Í gerandisdegnum verður vilji vístur, men munagóð átøk vanta enn. Uppgávan liggur hjá politisku myndugleikunum, hjá vinnuni, hjá borgarunum og hjá okkum í IRF.

Landsstýrið arbeiðir við at dagføra burturkastkunngerðina frá 1988. Vit taka sjálvandi undir við, at burturkastkunngerðin verður dagførd, og at vit sum samfelag seta okkum burðardygg framtíðarmál á burturkast- og endurvinningarøkinum. IRF luttekur í arbeiðsbólkinum, sum arbeiðir við nýggju kunngerðini.

Tilverugrundarlagið hjá IRF er at innsavna og viðgera burturkast á umhvørvisliga rættan hátt, bæði fyri at fyribyrgja dálking av okkara umhvørvi og fyri at tryggja, at tilfeingið í burturkastinum verið hildið í ringrás.

IRF skal ganga á odda á burturkastøkinum og á nýskapandi og ágrýtnan hátt gera Føroyar grønari, betri og burðardyggari.





# HENDINGAR Í ÁRINUM

## **Nýggjur fíggjarleiðari** settur í starv



1. januar 2021 varð Jóhannus Danielsen settur sum fíggjarleiðari hjá IRF. Jóhannus er 56 ár, búsitandi á Toftum og er skrásettur grannskoðari.

Jóhannus hevur drúgvar royndir sum grannskoðari hjá Grannskoðarafelagnum Carl Vilhelm Weihe (fyrr Rasmussen & Weihe, nú Januar), har hann starvaðist í 16 ár, bæði í Havn og seinni sum leiðari á deildini í Saltangará. Í fimm ár arbeiddi hann sum fíggjarleiðari og starvsfólkaumsitari hjá Borg. Í tvey ár arbeiddi hann í egnari ráðgevingarfyritøku við bókhaldi, roknskapi, skatti og fígging.

Jóhannus hevur verið borgarstjóri í Nes kommunu seinastu tvær setturnar, men hann stillaði ikki upp aftur til seinasta kommunuval.

## Óli Ólason Olsen og Páll Lervig **25 ára starvsdag**

Í januar mánaði vóru 25 ár liðin, síðan Óli Ólason Olsen og Páll Lervig komu í starv hjá IRF. Óli arbeiðir við hagreiðing av serliga dálkandi burturkasti á Hagaleiti í Leirvík, og Páll arbeiðir í innsavningini í Suðuroy.

Í sambandi við starvsdagarnar skipaði IRF fyri móttøku í Leirvík og í Vági, har stjórin, Poul Andrias Joensen, ynskti teimum til lukku, handaði blómur og gávubrøv og ynskti framhaldandi gott samstarv.

Starvsfólkahópurin hjá IRF telur á leið 100 starvsfólk, og millum teirra teljast mong, ið hava verið hjá felagnum í nógv ár. Nevnd og leiðsla eru errin av hesum starvsfólkum, sum hvønn dag lyfta eina uppgávu av stórum samfelagsligum og umhvørvisligum týdningi.





*Aftanfyri f.v. Alvi Mortensen, Gunvá við Keldu og Oluf Müller*
*Frammanfyri f.v.: Jóanis Albert Nielsen, Hans Anders Jacobsen og Bjarki Henriksen*

# Nýggj nevnd í IRF

Á seinasta aðalfundi hjá IRF varð nevndin mannað av nýggjum, og hesi vórðu vald:

Gunvá við Keldu, Klaksvík, Hans Anders Jacobsen, Strondum, Oluf Müller, Kvívík, Jóanis Albert Nielsen, Sandavági, Bjarki Henriksen, Sandi, og Alvi Mortensen, Tvøroyri.

Nevndin skipaði seg beint eftir fundin við Hans Anders Jacobsen sum formanni og Jóanis Albert Nielsen sum næstformanni.

Í mun til gomlu nevndina vórðu 5 fólk skift úr nevndini. Í gomlu nevndini vóru: Tummas Lervig, Klaksvík, Artur Johansen, Strondum, Petra Iversen, Kvívík, Jonhard Joensen, Sandavági, Bjarki Henriksen, Sandi, og Kristina Roest, Trongisvági.

Nevndin hjá IRF verður vald eftir kommunuvalini og situr í fýra ár. Viðtøkurnar siga, at seks fólk verða vald í nevndina at umboða hvør sítt øki.



# Góð ráð í sambandi við húsabygging og umvæling

Í sambandi við bygging og umvæling av húsum eru fleiri hentar tænastur hjá IRF, sum húsaeigarar mugu hava í huga. Hetta vísti IRF á við tíðindaskrivi og lýsing í farna ári.

Fleiri av tænastunum hjá IRF verða ein partur av gerandisdegnum hjá húskjum í mong ár frameftir, og tískil er týdningarmikið at hugsa um hesi viðurskifti í sambandi við byggingina.

### Áðrenn byggingina

Áðrenn farið verður í gongd við byggingina ella umvælingina, er umráðandi at hugsa um staðseting av rottanga og ruskstativum. Rottangin má vera lættur at koma til, og lokið má altíð vera atkomuligt. Ruskstativið skal í mesta lagi standa 20 metrar frá koyrivegi, men hevur húskið fleiri ruskstativ, kunnu tey í mesta lagi standa 10 metrar frá koyrivegi.

### Undir byggingini

Tá ið byggingin/umvælingin er farin í gongd, ber til at leiga bingju ella last frá IRF. Tað er sera týdningarmikið at skilja burturkastið, soleiðis at bara eitt slag av burturkasti er í hvørjari bingju/last. Stórsekkir kunnu keypast til tyrviburturkast sum t.d. glasull, gips og asbest.

Í sambandi við tekning av køki er týdningarmikið at minnast til, at pláss skal vera til eina góða skiljiskipan í køkinum. Vit mæla til at hava minst fimm íløt í køkinum – eitt til pappír og papp, eitt til bleytt plast, eitt til glasíløt, eitt til jarn/metal og eitt til restburturkast. Eisini er skilagott at seta pláss av til ymiskar skiljimøguleikar eitt nú í kjallararúmi ella bilhúsi.



### Tá ið flutt verður inn

Tá ið húskið flytur inn í húsini, skal IRF fáa fráboðan um bústaðin, soleiðis at húskið verður meldað til rottangatøming og innheintan av burturkasti.

# Skiljing av sjóvinnuburturkasti

Nógv burturkast kemur inn til IRF frá føroysku sjóvinnuni. Fyri at gera skiljingina av burturkasti so skynsama sum gjørligt hevur IRF gjørt eina vegleiðandi skiljiplakat við ymsu burturkastbólkunum í sjóvinnuni.

Høvuðsendamálið við plakatini er at geva eitt skjótt og einfalt yvirlit yvir burturkastbólkarnar í sjóvinnuni, og hvussu teir skulu skiljast.

Plakatin tekur støði í tí mest viðkomandi burturkastinum frá skipum, havnum, fiskavirkjum og alifyritøkum. Hon er í høvuðsheitum samansett av myndum, og teksturin á plakatini er á føroyskum, enskum og russiskum, soleiðis at flest øll starvsfólk í sjóvinnuni kunnu skilja hana. Í fjør gjørdi IRF eina líknandi plakat til skiljing av byggiburturkasti, sum hevur verið sera væl móttikin í byggivinnuni.

Plakatirnar um sjóvinnuburturkast og byggiburturkast kunnu takast niður á www.irf.fo og kunnu eisini bíleggjast frá IRF sum prentað eintak úr slitsterkum tilfari.





# Filmar um skiljing og endurvinning













IRF varpaði í 2021 ljós á endurvinning og skiljing við nøkrum stuttum lýsingarfilmum. Filmarnir eru gjørdir sum sokallaðir „Stop motion" filmar og eru allir framleiddir úr endurnýtslutilfari. Filmarnir eru um papp og pappír, reyða posa og glas, og teir vórðu vístir í SvF og á teimum sosialu miðlunum. Høvuðsendamálið við filmunum var at greiða fólki frá, at tað er týdningarmikið at skilja burturkast, so at vit kunnu endurvinna meira og brenna minni.

Í sambandi við filmarnar vórðu tíðindi eisini løgd á heimasíðuna, sum stuðlaðu upp undir filmarnar.

### Hví skulu vit skilja pappír og papp?

Pappír og papp kann endurvinnast 7-10 ferðir, uttan at styrkin í trevjuni viknar. Vikubløð kunnu t.d. blíva til tíðindabløð, sum so seinni kunnu blíva til pappkassar. Tú skilir pappír og papp frá vanliga húsarhaldsburturkastinum, og síðan sendir IRF tað til endurvinning uttanlands, so tað kann gerast um til nýggjar vørur úr pappíri og pappi. Endurvunnið pappír og papp er líka haldgott sum pappír og pappvørur, ið eru gjørdar úr træi. Tá ið vit endurvinna pappír og papp, verja vit skógin, minka luftdálkingina og spara orku.

### Øll eiga at brúka reyða posan

IRF veitir húsarhaldum ein reyðan posa, sum skal brúkast til serliga dálkandi burturkast, so sum battarí, ljósperur, spreydósir, smærri elektroniskar lutir og kemikalii. Tað er sera týdningarmikið at brúka reyða posan, so at serliga dálkandi burturkast ikki endar í ovninum á brennistøðini og dálkar umhvørvið, ella er til vanda fyri starvsfólk, sum handfara tað.

Tað serliga dálkandi burturkastið, sum kemur til IRF í reyða posa, verður skilt, pakkað og sent av landinum. Ein partur verður sendur til endurvinning, og restin verður brend á serútgjørdum brennistøðum, ið brenna við serliga nógvum hita. Á henda hátt verður tryggjað, at eingi dálkandi evni enda í náttúruni, samstundis sum hitin frá brenningini fer til fjarhita og elveiting.

### Hví endurvinna glas?

Tað er skilagott at skilja glas frá vanliga húsarhaldsburturkastinum, tí glas kann endurvinnast umaftur og umaftur, uttan at góðskan á tilfarinum versnar. Tískil er glas eitt sera virðismikið tilfeingi, tá ið hugsað verður um ringbúskap. Hugsjónin handan ringbúskapin er, at einki tilfeingi skal fara burtur, men í staðin skal tað endurnýtast ella endurvinnast í nýggjum samanhangi. Tað natúrliga tilfeingið skal haldast í ringrás sum longst heldur enn at verða brent.

Glasendurvinning betrar eisini um arbeiðsumhvørvið hjá innsavnarum av gráa posanum, tí glas fyllir og vigar nógv, og harafturat minkar tað um vandan at skera seg av brotnum glasi, sum liggur leyst í gráa posanum.

Umhvørvisliga loysir tað seg at endurvinna glas, tí at framleiða vørur úr endurvunnum glasi er ikki eins orkukrevjandi og at framleiða glas úr nýggjum rávørum. Við glasendurvinning er ikki neyðugt at framleiða nýtt glas, og útvinning av rávørum og útlát av vakstrarhúsgassum minkar.



# **Reisigildi** úti í Nýggjheiðum

Í juli mánaði var reisigildi á nýggja rottanga- og tyrvingarplássinum úti í Nýggjheiðum í Kvívík. Tað var í desember 2019, at IRF og Tórshavnar kommuna skrivaðu undir at gera felags rottanga- og tyrvingarpláss, og higartil hevur arbeiðið gingið eftir ætlan.

J&K Petersen stendur fyri byggingini, sum væntandi verður liðug seinast í 2022.

### Um verkætlanina

Staðsetingin av nýggja plássinum er vald út frá tí góða og slætta lendinum úti í Nýggjheiðum í Kvívík, og so verður plássið eisini í hóskandi frástøðu frá bygdum øki. Nógv orka er løgd í at laga verkætlanina so væl til lendið sum gjørligt.

Nýggja plássið verður mett at kunna nøkta tørvin komandi 30 árini. Hetta skal sjálvandi takast við ávísum fyrivarni sæð í mun til samfelagsgongdina og menningina á endurvinningarøkinum sum heild.

Nýggja tyrvingar- og rottangaplássið er eitt samstarv millum IRF og Tórshavnar kommunu. Eins og á nógvum øðrum økjum innan fyri burturkast- og endurvinning hevur tað víst seg, at samstarvið partanna millum hilnast væl og lønar báðum pørtum.

# Tiltak fyri **kommunal bingju- og endurnýtslupláss**

Í september skipaði IRF fyri afturvendandi tiltakinum, har starvsfólk frá kommunalu bingju- og endurnýtsluplássunum kring landið og umboð úr bý- og bygdaráðum koma saman. Hesa ferð var tiltakið í Bygdarhúsinum í Leirvík. Undirtøkan var sera góð, tí umleið 80 fólk luttóku, og næstan allar limakommunurnar vóru umboðaðar.



Virksemið hjá IRF fevnir um allar Føroyar – frá norðasta horni til sunnasta spíssin, og tískil er tað ikki á hvørjum degi, at høvi býðst pørtunum at møtast.

Á skránni var m.a. ein støðulýsing av øllum bingjuplássum, sum nýliga er gjørd og send kommununum. Harumframt greiddi IRF frá dagføring av íløtum og skilj-ing av ymiskum burturkastbólkum. Høvi var hjá øllum luttakarum at fáa greiðu á ymiskum ivamálum um skilj-ing og annað, og síðan varð skipað fyri rundferð hjá IRF úti á Hagaleiti í Leirvík.



# **Starvsfólkatiltak við Matkovanum** um gagnnýtslu av avroðum



Eftir flettingina í heyst skipaði Matkovin fyri einum øðrvísi tiltaki um gagnnýtslu av avroðum fyri starvsfólkini hjá IRF. Nógvir møguleikar eru at gagnnýta tað tilfeingið, sum fæst burtur úr seyðinum, og hesum ger Matkovin nógv burturúr.

IRF fegnast um virksemið hjá Matkovanum, sum stimbrar undir gagnnýtslu av tí, sum kemur burtur úr flettingini, tí hetta kann samstundis minka um nøgdirnar av lívrunnum burturkasti at brenna.



Tiltakið byrjaði við framløgu við Sunnivu Mortensen frá Matkovanum, har hon vísti á týdningin at økja virðingina fyri avroðunum og at læra fólk at gagnnýta tey. Eftir framløguna varð farið til borðs, har dugnaligi kokkurin Kári Kristiansen stóð fyri matgerðini.

Hann borðreiddi fýra rættir við ymiskum seyðaavroðum: hjarta, nýru, livur, vomb og blóð.

### Rættirnir vóru:

- Livrasúlta við reyðrót
- Hjarta og nýru í escabeche
- Epla- og purrusúpan við vambardálum
- Muffin við blóði, banan og sjokulátabitum

Seyðaavroðini vóru frá Óla bónda í Leirvík, og grønmetið var frá Jóannesi bónda í Miðstovugarði á Sandi. Sostatt var talan um eina serføroyska máltíð við hágóðskurávørum.



# Alt virksemið hjá IRF fingið **ISO-góðkenning**


DNV

LEDELSESSYSTEM CERTIFIKAT

Certifikat nummer: 10000474798-MSC-DNV-DNK
Første certificering: 06. oktober 2021
Gyldighedsperiode: 06. oktober 2021 – 05. oktober 2024

Det attesteres hermed, at ledelsessystemet hos for implementering af FN's Verdensmål hos
**IRF**
Vikarvegur 107, FO-520, Leirvik, Faroe Islands
og lokationer nævnt i Appendiks til dette certifikat

opfylder kravene i DNV GL's kravgrundlag for implementering af FN's Verdensmål for en bæredygtig udvikling og har udvalgt og efterfølgende prioriteret nedennævnte FN Verdensmål

Sikre at alle har adgang til vand og sanitet og at dette forvaltes bæredygtigt
Delmål: 6.3 & 6.b

Sikre at alle har adgang til pålidelig, bæredygtig og moderne energi til en overkommelig pris
Delmål: 7.2

Sikre bæredygtige forbrugs- og produktionsformer
Delmål: 12.4, 12.5 & 12.8

Handle hurtigt for at bekæmpe klimaforandringer og deres konsekvenser
Delmål: 13.3

Bevare og sikre bæredygtigt brug af verdens have og deres ressourcer
Delmål: 14.1

Styrke det globale partnerskab for handling og øg midlerne til at nå målene
Delmål: 17.14 & 17.16

Sted og dato: Hellerup, 06. oktober 2021

For udstedende enhed: DNV - Business Assurance, Tuborg Parkvej 8, 2., 2900 Hellerup, Denmark

Jesper Schultz
Adm. Direktør

Manglende opfyldelse af betingelser i certificeringskontrakten kan gøre certifikatet ugyldigt.
CERTIFYING UNIT: DNV Business Assurance Denmark A/S, Tuborg Parkvej 8, 2., 2900, Hellerup, Denmark
TEL: +45 39 45 48 00. www.dnv.dk/assurance


DNV

LEDELSESSYSTEM CERTIFIKAT

Certifikat nummer: 203834-2016-AE-DEN-DANAK
Første certificering: 13. juli 2016
Gyldighedsperiode: 23. september 2021 – 08. juli 2022

Det attesteres hermed, at ledelsessystemet hos
**IRF**
Vikarvegur 107, FO-520, Leirvik, Faroe Islands
og lokationer nævnt i Appendiks til dette certifikat

opfylder kravene i ledelsessystemstandarden for miljø:
**ISO 14001:2015**

Dette certifikat er gældende for følgende område:
**Indhentning, håndtering og salg af renset spildolie samt indhentning, håndtering og bortskaffelse af farligt affald**

Sted og dato: Hellerup, 23. september 2021

DANAK
SYSTEM Reg.nr. 6001

For udstedende enhed: DNV - Business Assurance, Tuborg Parkvej 8, 2., 2900 Hellerup, Denmark

Jesper Schultz
Adm. Direktør

Manglende opfyldelse af betingelser i certificeringskontrakten kan gøre certifikatet ugyldigt.
AKKREDITERET enhed: DNV Business Assurance Denmark A/S, Tuborg Parkvej 8, DK-2900 Hellerup, Danmark - TEL: +45 39 45 48 00. http://assurance.dnv.com

Í juli og august mánað varð innan- og uttanhýsis skoðan framd hjá IRF, og nú eru allar deildir hjá IRF góðkendar sambært ISO-14001. Frammanundan vóru bara tvær deildir hjá IRF (Oljureinsiverkið og Serhøllin) umfataðar av umhvørvisstýrisskipanini ISO-14001, men hetta er nú galdandi fyri alt IRF. Umframt at allar støðirnar hjá IRF nú eru ISO-góðkendar, hevur IRF fingið ISO-góðkenning fyri at hava sett heimsmálini hjá ST í verk. Umhvørvispolitikkurin hjá IRF tekur støði í seks av teimum 17 heimsmálunum fyri burðardygga menning, og hann útgreinar kós felagsins í arbeiðinum fram ímóti at gera Føroyar reinari og burðardyggari.

ISO-leiðsluskipanir eru stýringsamboð, ið verða nýtt kring allan heimin og verða nú eisini partar av gerandisdegnum hjá IRF.

Endamálið við leiðsluskipanunum er eitt nú at tryggja, at øll starvsfólk arbeiða eftir sama leisti, soleiðis at góðskan á arbeiðinum verður so góð og jøvn sum gjørligt.

Hetta setur stór krøv til eitt nú mannagongdir og skrásetingar og fer at merkjast hjá flest øllum starvsfólkunum.




# Rebekka fingið **ÚSSM-prógv**

Í juni mánaði fekk Rebekka Jacobsen, ið arbeiðir sum skrivstovufólk hjá IRF, prógv í útbúgvingini fyri skrivstovufólk, samskiparar og móttøkufólk (ÚSSM).

Rebekka hevur tikið ÚSSM-útbúgvingini hjá Synergi.

Útbúgvingin er løgd til rættis sum ein samanrenning av undirvísing, coaching og sjálvlesnaði. Útbúgvingin er soleiðis háttað, at luttakararnir fáa lærutilgongdina at passa inn í arbeiðið og inn í ein gerandisdag, har nógv er at gera.

„Eg eri sera glað fyri at hava tikið hesa útbúgving, tí hon gevur mær góð amboð, sum eg kann brúka í gerandisdegnum. Tú lærir nógv um teg sjálva, og hvussu tú verður effektivari í arbeiðinum," sigur Rebekka Jacobsen.

IRF leggur seg støðugt eftir at førleikamenna starvsfólk, og leiðslan fegnast um, at Rebekka hevur fingið prógv í eini útbúgving, har dentur hevur verið lagdur á bæði persónliga og fakliga menning.




# **Nýggj vekt** á Hagaleiti

Alt burturkast, sum kemur inn til IRF, verður í dag avroknað í rúmmetrum (m³), men í framtíðini fer IRF at avrokna í vekt (kg). Í hesum sambandi er íløga gjørd í eina vekt á Hagaleiti, har allir bilar, sum koma inn við burturkasti, skulu vigast.

Endamálið við hesum er at fáa betri og neyvari skráseting av burturkastmongdini (í kg) fyri hvønn burturkastbólk. Summir bilar hava innbygda bilvekt í dag, men skrásetingin av mongd í kg verður ikki altíð gjørd, tí ongin føst mannagongd hevur verið fyri tað. Aðrir bilar hava ikki vekt í bilinum, og hjá hesum bilum hevur higartil verið gjørd ein meting av, hvussu full lastin/bingjan er. Tískil hava vit ikki havt eina neyva umrokning av kg pr. m³ fyri hvønn einstakan burturkastbólk.

### Neyvari og betri hagtøl

Við at viga burturkastið fáa vit frameftir betri yvirlit yvir hagtøl, og harafturat kunnu vit veita hagtøl til fyritøkur, sum í stóran mun vilja hava ein umhvørvisroknskap yvir sítt virksemi.

Harvið fara fyritøkur eisini at fáa betri yvirlit yvir kostnaðin, um tey ikki skilja burturkastið nøktandi og kunnu gera inntriv fyri at betra um skiljingina.

### Fleiri vektir á støðunum hjá IRF

Nýggja vektin á Hagaleiti verður roynd í 2022, og síðani verður hon endaliga tikin í nýtslu í 2023. Komandi tvey árini fara vit eisini at seta vektir upp á støðunum á Gjánoyri, í Trøllavík og úti í Nýggjheiðum.

# Nýtt **borðspæl** frá IRF

Sum liður í upplýsingartilfari um umhvørvi og skiljing av ruski hevur IRF gjørt eitt nýtt spæl, sum hevur til endamáls at fáa bæði børn og vaksin at hugsa meira um burturkastøkið. Spælið er serliga rættað móti børnum í aldrinum 4-12 ár, men er eisini sera væl egnað sum familjuspæl. Spælið er skipað sum ein innsavningarleið, og á vegnum skulu ymiskir spurningar svarast um burturkastøkið.

IRF er farið inn í eitt samstarv við Angelu og Hannibal um barnatilfar. Tey hava í nógv ár gjørt undirhald og ymiskt tilfar til børn, bæði á palli og í sjónvarpinum. IRF-spælið er so tað fyrsta, sum er framleitt í samstarvi við tey bæði, og meira barnatilfar verður eisini gjørt í 2022. Spælið verður fyrst og fremst brúkt sum kunnandi tilfar til barnagarðar og yngstu skúlaflokkarnar.





# HAGTØL 2021



IRF viðger burturkast eftir trimum høvuðsháttum: Endurvinning, orkuútvinning (brenning) og tyrving. Endurvinningarburturkast er tilfeingi, ið kann verða til nýggjar vørur, t.d. papp. Burturkast, ið ikki kann endurvinnast, t.d. húsarhaldsrusk, verður brent, og hitin verður nýttur til fjarhita. Tilfar, ið hvørki kann endurvinnast ella brennast, t.d. gips, verður tyrvt. IRF arbeiðir fram ímóti, at so nógv burturkast sum gjørligt verður endurvunnið, í aðru atløgu brent og í síðsta enda tyrvt.

Í 2021 tók IRF ímóti 42.109 tonsum av burturkasti (Tava 1). IRF brendi 59,3% av hesum burturkastinum, endurvann 33,2% og tyrvdi 7,5%. Hetta býtið sæst á ritmynd 1.

**Talva 1** – Burturkastnøgdir, sum IRF tók ímóti í 2018-2021. Fyri at kunna samanbera hagtøl eru nøkur tøl umroknað frá m³ til tons.

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Endurvinning | 13.968 | 11.777 | 12.209 | 11.926 |
| Orkuútvinning (brenning) | 24.967 | 24.648 | 24.589 | 21.773 |
| Tyrving | 3.174 | 4.305 | 5.198 | 5.210 |
| **Tilsamans** | **42.109** | **40.730** | **41.996** | **38.909** |

**Ritmynd 1** – Býtið millum bólkar 2021

- Endurvinning
- Orkuútvinning
- Tyrving




Talva 2 vísir vøkstur og minking í burturkastmongdunum seinastu fýra árini. Í 2021 var ein 3,4% hækking í burturkastmongdunum samanborið við 2020. Burturkastnøgdirnar, sum fóru til orkuútvinning í 2021, standa mestsum í stað, og nøgdirnar til endurvinning eru hækkaðar 18,6% samanborið við 2020. Ein stórur partur av hesum vøkstrinum kemst av, at IRF hevði tríggjar avskipingar av jarni í 2021 í mun til bert eina í 2020. Nøgdirnar av burturkasti til tyrving eru minkaðar 26,3%.

**Talva 2** – Vøkstur og minking í burturkastnøgdum 2018–2021

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Endurvinning, % | 18,6% | -3,5% | 2,4% | 8,1% |
| Orkuútvinning (brenning), % | 1,3% | 0,2% | 12,9% | 3,8% |
| Tyrving, % | -26,3% | -17,2% | -0,2% | 74,6% |
| **Tilsamans, %** | **3,4%** | **-3,0%** | **7,9%** | **11,2%** |

## Endurvinning

IRF sendir nógvar ymiskar burturkastbólkar av landinum til endurvinning. Í 2021 fór fyrsta sendingin av glasi, sum áður var brent, til endurvinning. IRF hevur ment seg nógv á endurvinningarøkinum seinastu árini, og fleiri burturkastbólkar, ið fyrr vórðu brendir ella tyrvdir, eru fluttir uppeftir á burturkasttrappuni og verða nú sendir av landinum til endurvinning. Í 2021 løgdust graslíki og glas afturat. Talva 3 vísir yvirskipaðu burturkastbólkarnar, ið verða sendir til endurvinning. Hvør bólkur sær er útgreinaður í talvunum 4-8.

**Talva 3** – Burturkastnøgdir til endurvinning 2018–2021 (tons)

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Papp og pappír | 2.658 | 2.464 | 1.992 | 2.062 |
| Plast | 1.194 | 867 | 844* | 629 |
| Jarn og metal | 4.127 | 2.233 | 2.902 | 3.059 |
| Elektronikkur og káplar | 151 | 191 | 157 | 173 |
| Plantuolja | 10 | 10 | 5 | - |
| Serburturkast | 140 | 151 | 115 | 155 |
| Spillolja | 1.897 | 1.805 | 2.023 | 2.138 |
| Reinsað vatn | 3.781 | 4.056 | 4.172 | 3.711 |
| Glas | 10 | - | - | - |
| **Tilsamans** | **13.968** | **11.777** | **12.209** | **11.926** |

* Í hagtølunum frá 2019 stóð 771 tons av plasti. Rætta talið er 844 tons.

## Pappír og papp

Endurvinningarhøllin á Hagaleiti tekur ímóti pappíri og pappi úr øllum landinum. Í 2021 var samlaði útflutningurin 2.658 tons, og hetta er ein 8% hækking samanborið við 2020 (Talva 4). Verður hugt at býtinum millum papp og pappír, sæst, at tað er serliga nøgdin av pappi, ið økist.

**Talva 4** – Mongdir av pappi og pappíri til endurvinning 2018-2021 (tons)

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Pappír | 585 | 529 | 484 | 612 |
| Papp | 2.073 | 1.935 | 1.507 | 1.450 |
| **Tilsamans** | **2.658** | **2.464** | **1.992** | **2.062** |

## Plast

IRF mennist støðugt, tá ið tað snýr seg um plastendurvinning, og í 2021 vórðu 1.195 tons av plasti send til endurvinning (Talva 5). Í 2021 sendi IRF fyri fyrstu ferð graslíkisvøllir til endurvinning. Við tveimum sendingum bleiv mongdin til 211 tons. Størsti plastbólkurin til endurvinning í 2021 var stórsekkir. Hesin bólkurin hækkaði 41% úr 277 tonsum í 2020 til 392 tons í 2021. Mongdin av aliringum og fóðurslangum er minkað nakað, og mongdin av einnýtisfløskum úr PET-plasti, t.d. sodavatnsfløskur, liggur støðugt um 100 tons árliga. Bleytt vøruplast er hækkað frá 73 tonsum í 2020 til 87 tons í 2021.

**Talva 5** – Mongdir av plasti til endurvinning 2018-2021 (tons)

| **Plast** | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Trol og net | 257 | 278 | 245 | 141 |
| Stórsekkir | 392 | 277 | 270 | 217 |
| Aliringar og fóðurslangur | 133 | 140 | 166 | 106 |
| Einnýtisfløskur PET | 97 | 94 | 96 | 107 |
| Bleytt vøruplast | 87 | 73 | 58 | 55 |
| Annað hart plast | 18 | 5 | 9 | 3 |
| Graslíki | 211 | - | - | - |
| **Tilsamans** | **1.195** | **867** | **844** | **629** |



## Elektronikkur

Í 2021 útflutti IRF 151 tons av káplum og elektronikki til endurvinning. Av hesum vóru 110 tons elektronikkur og 41 tons káplar (Talva 6). Tað er sera týdningarmikið fyri IRF, at elektronikkur og káplar, sum innihalda nógv metal, fara til endurvinning og ikki verða brend, tí talan er um virðismikið tilfeingi, sum kann endurvinnast umaftur og umaftur.

**Talva 6** – Mongdir av elektronikki og káplum til endurvinning 2018–2021 (tons)

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Elektronikkur | 110 | 138 | 118 | 114 |
| Káplar | 41 | 53 | 39 | 59 |
| **Tilsamans** | **151** | **191** | **157** | **173** |

## Jarn og metal

Í 2021 sendi IRF 4.127 tons av jarni og metalum til endurvinning (Talva 7). Hesin burturkastbólkur verður smeltaður um til nýggjar lutir ella nýtt tilfeingi og kann endurvinnast nógvar ferðir. Størsti bólkurin í 2021 er blandað jarn við 3.403 tonsum. Orsøkin til, at hetta talið er sera høgt samanborið við 2020, er, at tað vóru tríggjar avskipingar í 2021 og bert ein avskiping í 2020.

Í 2021 vórðu eisini 26 tons av einnýtis metalíløtum og 58 tons av øðrum metalum, so sum kopar, aluminium og rustfrítt stál, send til endurvinning uttanlands.

Í 2021 tók IRF ímóti 534 bilvrakum, ið svara til 641 tons. Øll bilvrak, sum IRF tekur ímóti, verða send til Kommunalu Brennistøðina á Hjalla til umhvørvisviðgerð, áðrenn tey verða send av landinum sum gamalt jarn.

**Talva 7** – Jarn og metal til endurvinning 2018-2021 (tons). Miðalvektin á bilvrakum í hagtølunum er ásett at vera 1,2 tons.

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Jarn | 3.403 | 1.436 | 2.131 | 2.251 |
| Einnýtis metalíløt | 26 | 27 | 29 | 34 |
| Bilvrak | 641 | 710 | 684 | 721 |
| Annað metal | 57 | 60 | 58 | 53 |
| **Tilsamans** | **4.127** | **2.233** | **2.902** | **3.059** |



## Serburturkast

Nakrir burturkastbólkar, ið IRF tekur ímóti, verða sendir til serviðgerð uttanlands, tí teir innihalda evni, ið eru dálkandi, t.d. er kyksilvurið í eldri spariperum sera dálkandi fyri umhvørvið. Samanlagt sendi IRF 145 tons av burturkasti til serviðgerð í 2021 (Talva 8).

IRF sendi 4 tons av kemikalium uttanlands í 2021. Ongin evja frá nótavaski bleiv send til brenning uttanlands í 2021, og hetta er orsøkin til stóru minkingina í samlaðu mongdini – frá 205 tonsum til 145 tons. Av tí at ongin evja frá nótavaski bleiv avskipað í 2021, verður væntandi ein størri nøgd avskipað í 2022.

Ein partur av serburturkastinum, sum verður sent uttanlands, verður endurvunnin. Tá er mannagongdin, at dálkandi evni fyrst verða burturbeind á tryggan hátt, og síðan verða metal og glas endurvunnin. Í 2021 vórðu m.a. 73 tons av køli- og frystiskápum, 48 tons av akkumulatorum, 10 tons av battaríum, 4 tons av trýstfløskum og 3 tons av ljósperum send til endurvinning. Máling og prentarapatrónir koma inn til IRF sum serburturkast. Tey verða brend á Hagaleiti, men mongdirnar verða ikki skrásettar.

**Talva 8** – Mongdir av serburturkasti 2018–2020 (tons)
Alt uttan evja frá nótavaski, kemikaliiburturkasti og fýrverk fer til endurvinning

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Evja frá nótavaski | - | 50 | 46 | 97 |
| Kemikaliiburturkast | 4 | 2,8 | 13,8 | 4,0 |
| Fýrverk | 1 | 0,7 | 0,4 | 0,4 |
| Trýstfløskur | 4 | 3,9 | 2,5 | 7,0 |
| Spreydósir | 3 | 2,0 | | |
| Ljósperur og ljósrør | 3 | 2,5 | 2,5 | 3,0 |
| Battarí | 10 | 8,2 | 7,1 | 8,6 |
| Akkumulatorar | 48 | 64 | 42 | 72* |
| Køli- og frystiskáp | 73 | 71 | 61 | 64 |
| **Tilsamans** | **145** | **205** | **175** | **256** |

* Í hagtølunum 2018 stóð 80 tons. Rætta talið er 72 tons.

## Brenning

Í 2021 tók IRF ímóti 24.967 tonsum av burturkasti at brenna. Í 2021 vórðu 24.891 tons av burturkasti brend á Hagaleiti, og árið fyri vórðu 25.945 tons brend (Talva 9). Harafturat vórðu eisini 71 tons av burturkasti brend á Kommunalu brennistøðini á Hjalla, meðan brennistøðin á Hagaleiti lá still í sambandi við umvælingar.

**Talva 9** – Burturkast til brenning 2018-2021 (tons)

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Burturkast á goymslu við ársbyrjan | - | -1.544 | -4.303 | -1.465 |
| Burturkast brent á Hagaleiti | 24.891 | 25.945 | 26.843 | 18.394 |
| Burturkast brent á Hjalla | 71 | 134 | 445 | 440 |
| Endurvinningarburturkast at brenna | - | 60 | | |
| Evja frá nótavaski | - | 50 | 46 | 97 |
| Kemikaliiburturkast | 4 | 2,8 | 14 | 4 |
| Burturkast á goymslu við árslok | - | - | 1.544 | 4.303 |
| **Móttikið burturkast at brenna í alt** | **24.967** | **24.648** | **24.589** | **21.773** |

Brennistøðin var í rakstri 8.096 tímar í 2021. Hetta svarar til, at ovnurin hevur ligið stillur í 28 dagar (Talva 10). Ovnurin brendi í miðal 3,1 tons um tíman, sum svarar til 74 tons um samdøgrið.

**Talva 10** – Rakstrarhagtøl brennistøðin 2018–2021

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Brennitímar, tímar | 8.096 | 8.347 | 8.502 | 6.267 |
| Dagar, ið brennistøðin lá still | 28 | 18 | 11 | 104 |
| Brent hjá IRF, tons/tíma | 3,1 | 3,1 | 3,2 | 2,9 |
| Brent hjá IRF, tons/dag | 74 | 75 | 76 | 70 |

Orkuframleiðslan hjá brennistøðini var 70.352 MWh í 2021, og av hesum vóru 14.765 MWh veittir sum fjarhiti til Høvdavirkið og til IRF á Hagaleiti (Talva 11). Hetta svarar til, at nýtslustigið av fjarhitanum er 21%, sum er á leið tað sama sum árið fyri.

**Talva 11** – Orkuframleiðsla og fjarhitanýtsla brennistøðin 2018–2021 (MWh)

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Orkuframleiðsla | 70.352 | 73.596 | 69.513 | 38.900 |
| Veittur fjarhiti | 14.765 | 16.389 | 19.849 | 4.133 |
| Veittur fjarhiti, % | 21% | 22% | 29% | 11% |

Í 2021 vórðu samanlagt 3.402 tons av ilsku frá brennistøðini tyrvd á umhvørvisgóðkendum tyrvingarplássum, (Talva 12). Ilska er botnøskan úr ovninum, ella sagt við øðrum orðum, tað, sum er eftir, tá ið burturkastið er brent. Úr roykreinsiskipanini komu 485 tons av flogøsku. Hendan øskan, sum er serliga dálkandi, verður tyrvd í Noregi á góðkendum stað.

**Talva 12** – Mongdir av ilsku og flogøsku (restproduktum) 2018–2021 (tons)

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Ilska | 3.402 | 3.563 | 4.286 | 3.273 |
| Flogøska | 485 | 469 | 544 | 481 |



### Tyrving

Í 2021 tók IRF ímóti 3.174 tonsum av burturkasti at tyrva (Talva 13). Hetta fevnir m.a. um asbest, PVC, glas- og steinull, gips og keramikk. Íroknað ilsku vórðu íalt 6.576 tons tyrvd í 2021.

IRF fegnast um góðu gongdina seinastu árini, har alsamt fleiri burturkastbólkar verða fluttir upp eftir burturkasttrappuni. Sum dømi kann nevnast, at gras-líkisvøllir, trol, net, nailonendar og nailontrossar, sum áður vórðu tyrvd, nú fara til endurvinning. Eisini eru burturkastbólkarnir troldtekt, glastrevja og sandwich-modul fluttir frá tyrving upp til orkuútvinning (brenning).

**Talva 13** – Mongdir av tyrviburturkasti 2018-2021 (tons)

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Tyrviburturkast | 3.174 | 4.305 | 5.198 | 5.210 |
| Ilska | 3.402 | 3.563 | 4.286 | 3.273 |
| **Tilsamans** | **6.576** | **7.868** | **9.484** | **8.483** |

### Oljureinsiverkið

Oljureinsiverkið hjá IRF tók ímóti 5.864 tonsum av spillolju og oljudálkaðum vatni í 2021. Samanlagt reinsaði og seldi verkið 1.897 tons av olju í 2021 (talva 14).

